# ítróttur

Nr. 80 • hósdagur • 4. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo




*Liðskiparin hjá KÍ, Ragna Patawary, við steypinum eftir finaluna á Tórsvølli leygardagin, sum KÍ vann heili 15-0*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Kvinnurnar hjá KÍ einaráðandi

**Triðja árið á rað vunnu kvinnurnar hjá KÍ steypafinaluna, tá ið tær leygardagin vunnu stórsigur, 15-0, á kvinnunum hjá EB/Streymi**


STEYPAFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Seinastu mongu árini hevur tað verið ein sannroynd, at lítil og eingin spenningur er í føroyska kvinnufótbóltinum. Orsøkin er einføld, tí kvinnurnar hjá KÍ hava verið fullkomiliga einaráðandi, og munurin millum klaksvíkskvinnur og tey flestu av hinum liðunum er ovurhonds stórur, og tað sæst aftur á úrslitunum.



*Kvinnurnar hjá KÍ eru steypavinnarar triðja árið á rað. Sosialurin ynskir teimum hjartaliga tillukku við sigrinum*

*mynd: Jens Kr. Vang*

## Malena stóri málslúkarin

Á liðnum hjá KÍ eru fleiri, ið hava leikt í nógv ár. Nøvn sum Bára Skaale Klakstein, Malena Josephsen og tær báðar tvíburðasystrarnar Rannvá og Ragna Andreasen eru væl kend millum teir, ið hava fylgt bara eitt lítið sindur við í føroyska kvinnufótbóltinum.

Í steypafinaluni á Tórsvølli leygardagin var mótstøðuliðið hjá KÍ felagsliðið úr EB/Streymi. Tað var kanska eitt sindur óvæntað, men sundalagskvinnurnar hava staðið seg væl í ár, og tí hava tær eisini uppiborið eitt finalupláss. Kvinnurnar hjá EB/Streymi noyddust tó skjótt at staðfesta, at KÍ-kvinnurnar eru í einum flokki fyri seg. Tað gjørdi heldur ikki uppgávuna hjá EB/Streymi lættari, at leikt var á grasi, tí tað hava tær lítlar og ongar royndir við, meðan KÍ-kvinnuar hava roynt hetta fleiri ferðir, bæði í Europa-Cup og við landsliðnum til oyggjaleikirnar.

Tað tók heldur ikki langa tíð, so sást týðuliga, hvønn veg tað fór at ganga. Longu áðrenn 20 minuttir vóru leiktir av fyrra hálvleiki, hevði KÍ lagt seg á odda 5-0! Sundalagskvinnurnar fingu ikki eitt bein til jørðina, og tær vóru rárir gestir á KÍ-hálvuni. Klaksvíkskvinnurnar hinvegin skoraðu mál upp á samliband, og tá ið farið var til hálvleiks, vóru tær longu komnar upp á tvey-siffrað. Heilt stóri málslúkarin hjá KÍ í steypafinaluni var veteranurin í álopinum, Malena Josephsen, ið skeyt ikki færri enn níggju mál, og tað man neyvan verða komið fyri fyrr í einari føroyskari steypafinalu. Høvdu klaksvíkskvinnur verið eins knáar í málskoringinii allan dystin, sum tær vóru fyrsta hálva tíman, so hevði sigurin verið tvífalt so stórur, tí tá var støðan longu 9-0 til klaksvíkskvinnur.

## Gott spæl

Um talan kanska ikki var um tann spennandi og undirhaldandi dystin, so var tað tó góður fótbóltur at síggja, tí KÍ spældi sera væl. Spælið gekk skjótt og lætt, og uppskriftin var ofta einføld, áðrenn bólturin lá í netinum hjá EB/Streymi. Serliga væl lá fyri KÍ-kvinnunum at brúka síðurnar, áðrenn bólturin aftur bleiv sendur inn í brotsteigin, og hetta gav verjuni hjá EB/-Streymi nógv høvuðbrýggj.

Sum áðurnevnt skoraðu klaksvíkskvinnur mál upp á samliband, og tær vóru eisini á odda 10-0 í hálvleikinum. Í seinna hálvleiki var ikki sama flogið yvir spælinum hjá greipuvinnarunum, men hetta forðaði teimum tó ikki í at skora enn fleiri mál, hóast tey ikki vóru eins nógv í tali sum fyri steðgin. KÍ skoraði fimm ferðir í seinna hálvleiki, og tískil gjørdist endaliga úrslitið av steypafinaluni hjá kvinnum 2004 ein trivaligur 15-0 sigur til KÍ á EB/Streym.

### FAKTA

**KÍ-EB/Streymur 15-0 (10-0)**
1-0 Rannvá Andreasen 6.
2-0 Kristina Eyðbjørnsdóttir 12.
3-0 Malena Josephsen 15.
4-0 Bára S. Klakstein 17.
5-0 Malena Josephsen 19.
6-0 Malena Josephsen 21.
7.0 Vivian Bjartalíð 25.
8-0 Malena Josephsen 26.
9-0 Malena Josephsen 30.
10-0 Malena Josephsen 45.
11-0 Malena Josephsen 52.
12-0 Malena Josephsen 54.
13-0 Rannvá Andreasen 62.
14-0 Vivian Bjartalíð 69.
15-0 Malena Josephsen 78.
**KÍ:** Randi Wardum - Ragna Patawary(Kathe Kalsø 55.), Jensa Sirdal(Annelisa Justesen 81.), Paula Mikkelsen(Anna Joensen 55.), Ann Olsen, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Elsa Maria Simonsen, Vivian Bjaratalíð, Bára S. Klakstein, Rannvá Andreasen, Malena Josephsen.
**EB/Streymur:** Fríða Ellingsgaard - Frida Gregersen, Doris Joensen(Eilin Mørkøre 55.), Sandra Kalsoy, Herfríð Hammer, Judith Jacobsen(Rigmor Zachariassen 46.), Evy Olsen, Lydia Vesturtún, Maria í Brekkunum(Gurið Samuelsen 85.), Rudi Zachariassen, Maria Zachariassen
**Gult kort:** Rudi Zachariasssen
**Dómari:** Edvard Højgaard
**Áskoðarar:** ca. 50








# Sær gott út hjá HB

**Við einum 2-0 sigri á VB í seinnu hálvfinaluni tryggjaði HB sær pláss í finaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Jákup á Borg skoraði sítt fyrsta mál í reyðu og svørtu troyggjuni**


LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Fyri fimtu ferð í ár hittust HB og VB til dyst. Liðini hava dystast eina ferð í landskappingini, og seinna hálvfinalan leygardagin var fjórði dysturin teirra millum í steypakappingini. Fyrra hálvfinalan í Vági endaði við javnleiki 1-1, og tí var alt púra opið undan dystin í Havn leygardagin.



*Í seinnu hálvfinaluni ímóti VB leygardagin eydnaðist tað Jákupi á Borg at skora sítt fyrsta mál í reyðu og svørtu strípunum.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

## Ungur miðvøllur

Í oddadystin í landskappingini mikukvøldið ímóti NSI høvdu havnarmenninir ognað sær tvinni reyð kort, og tað merkti, at hvørki liðskiparin Rúni Nolsøe ella bakkurin Janus Joensen kundu verða við í dystinum ímóti vágbingum. Harafturat hevði leikandi venjarin, Heine Fernandez, ein snudd at dragast við, og tað gjørdi, at hann byrjaði á beinkinum. Vágbingar noyddust at verða sterka litaviska áleyparan Mindaugas fyriuttan, tí at hann var leikbannaður. Harafturat er hin litavin, Dalius, sjúkur, og hann er farin heim til Litava at koma fyri seg.

HB-liðið var tí nógv broytt í mun til mikukvøldið, og teir tríggir leikararnir, ið nú sótu uttan fyri, blivu avloystir av trimum unglingaleikarum. HB stillaði upp í eini 4-3-3 uppstilling. Miðvøllurin var hesaferð mannaður við 23 ára gamla Kára Nielsen sum elsta manni og so teimum báðum unglingaleikarunum, Rókur av Fløtum Jespersen og Emil Nolsøe Leifsson. Harafturat avloysti Rasmus Nolsøe leikbannaða Janus Joensen á vinstra bakki.

Hjá VB var Mortan úr Hørg við aftur, og leikbannið hjá Mindaugas hevði við sær, at Birgir Jørgensen slapp at royna seg heilt har frammi.

## Jákup fekk hol á

Tað var HB, sum hevði greiða yvirvág í spæli fyri steðgin. Teir báðir kviku vengurnir hjá HB, Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni, sendu nógvar bóltin inn í brotsteigin, men Anders Sørensen og Eyðun Jacobsen hjá VB royndust drúgvir ímót Rógva Jacobsen hjá HB. Men verjan hjá VB fekk einki gjørt, tá ið fyrri hálvleikur var okkurt um 20 minuttir gamal. Ein bóltur bleiv sendur innfyri úr vinstra borði, og Rógvi Jacobsen longdi við høvdinum. Bólturin stakk fyri føturnar á Jákupi á Borg, og við einari róligari innarsíðu kundi hann skora sítt fyrsta mál fyri HB og leggja heimaliðið á odda 1-0.

Havnarmenninir høvdu bóltin nógv í fyrra hálvleiki, men tað gekk striltið hjá teimum at spæla seg til opnar málmøguleikar. Hinvegin gjørdust vágbingar sera lítið um seg fyri steðgin, og vanliga so sterki miðvøllurin hjá VB við Milan Kuljic á odda fekk ikki nógv burturúr. Ein av orsøkunum til hetta var ungi Emil Nolsøe Leifsson hjá HB, sum veruliga tók av, tá ið hann fekk høvi til at royna seg frá byrjan á besta liðnum. Emil tykist avgjørt verða ein framtíðar maður hjá HB, tí hóast sín unga aldur, so tordi hann at fara inn á miðvøllin og stýra bæði í spæli og við at tosa til sínar viðleikarar.

## Stórur saknur í Mindaugas

Í seinna hálvleiki lækkaði leikferðin munandi. Vágbingar komu meiri og meiri inn í dystin, men teir høvdu ilt við at fáa spælið niðan á HB-hálvuna. Havnarmenninir tóktust sum um, at teir bert vildu hava tíðina at ganga. VB fekk tó lagt eitt ávíst trýst á seinasta korterið, men framvegis høvdu teir stórar trupulleikar við at gerast veruliga vandamiklir. Saknurin í Mindaugas var stórur, tí at hann er ein álopsleikari, sum reikar nógv, og sum ofta kemur aftur á miðvøllin eftir bóltinum fyri síðani at bjóða verjuni hjá mótstøðuliðnum av. Ein slíkur maður hevði havt stóran týdning fyri vágbingar leygardagin, tí álopið hjá VB var sera tannleyst.

Onkuntíð leikaði eisini hart á framman fyri málinum hjá HB, men framvegis var bíðað eftir tí opna møguleikanum, sum tó ongantíð kom. Ístaðin vóru tað HB, sum vóru vandamiklir í kontraspælinum, tí VB hevði flutt so nógv fólk fram. Tað var eisini eftir júst eitt slíkt kontraálop, at HB køvdi steypadreymarnar hjá vágbingum, tá ið tíðin var um at verða farin. Rógvi Jacobsen slapp at renna allan vegin oman ímóti málinum hjá VB, og hann hevði bæði Heina Fernandez og Páll M. Joensen við sær. Rógvi valdi at royna sjálvur, men royndi sjálvur. Eitt VB-bein kom fyri, men bólturin stakk beint yvir til Heina Fernandez, og vandamikli danin setti vinstra fótin undir bóltin, og so var dysturin avgjørdur.

## Stór breidd

Við sigrinum á VB hevur HB tryggjað sær sess í steypafinaluni, har teir skulu dystast við NSÍ. Hetta er fjórðu ferð seinastu sjey árini, at HB er í finaluni, og ikki kann sigast annað enn, at tað sær gott út hjá teimum. Hópurin er stórur, og at breiddin er góð, sást væl leygardagin, tá ið unglingaleikarar komu inn og lyftu byrðina eftir meiri royndar leikarar. Tá ið so eisini verður havt í huga, at menn sum Bárður Johannesen, Hans á Lag og Martin Christensen hava verið skaddir leingi, og kanksa verða tøkir aftur skjótt, kann ikki annað sigast, enn at tað sær heilt gott út hjá føroyameistarunum.

### FAKTA

**HB-VB 2-0(1-0)**
1-0 Jákup á Borg 19.
2-0 Heine Fernandez 90.

HB: Danny Rasmussen - Hallur Danielsen, Símun Eliasen, Vagnus Mortensen, Rasmus Nolsøe - Kári Nielsen, Emil Nolsøe Leifsson, Rókur Jespersen(61. Heine Fernandez) - Jákup á Borg(83. Páll M. Joensen), Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni
VB: Bjarni Johansen - Anders Sørensen, Eyðun Jacobsen, Jákup F. Olsen(71. Michael í Lágabø), Mortan úr Hørg - Símun Samulesen (57. Palli Augustinussen), Milan Kuljic, Brian Andresen, Daniel Kristensen (71. Jón Pauli Olsen) - Dan Djurhuus, Birgir Jørgensen
Gult kort: Mortan úr Hørg, Birgir Jørgensen
Dómari: Suni Johansen